# Íslendingar vilja hava føroysk ítróttalið til Íslands

**Fleiri føroysk feløg hava longu víst stóran áhuga í at luttaka í VISA REY CUP í Reykjavík í juli mánað**

ÍTRÓTTAFERÐIR
*Páll Holm Johannesen*



*Føroyska-íslendska samtakið, sum ætlar at fáa ítróttafeløg til Íslands. Frá vinstru, Hørður Hilmarsson, stjóri á IT Travel, Ken Christensen, sølustjóri á Atlantic Airways og Magni Mouritsen stjóri á MB Tours.*
*Mynd: Jonhard Hammer*

Leygardagin hevði íslendingurin, Hørður Hilmarsson stjóri í IT Travel, kunning við føroysk ítróttafeløg og umboð fyri føroysku ferðavinnuna á Hotel Hafnia. Ætlanin við kunningini var at gera føroyingar varar við møguleikarnar hjá føroyingum at ferðast til Íslands.

Hørður Hilmarsson vísir á góðu møguleikarnir hjá ítróttarfeløgum og skúlaflokkum at koma til Íslands. Sjálvur hevur Hørður drúgvar royndir bæði innan ítróttin og ferðavinnu, og fyritøkan IT Travel hevur tí valt at leggja seg eftir ferðum fyri ítróttafólk.

Vanliga leggja føroyingar leiðina til Danmarkar, tá farið verður uttanlands við ítróttaliðum, men stendur tað til Hørður Hilmarsson, so skal hetta broytast.

– Danmark er óiva eitt frálíkt ferðastað fyri ítróttarlið, men tit mugu ikki gloyma okkum íslendingar, tí vit hava sanniliga eisini nýtíðarhentleikar at hýsa stórum ítróttakappingum, greiður Hørður Hilmarsson frá

IT Travel hevur høvuðsstøð við Laugardalsvøllin, og stjórin í IT Travel vil geva føroyingum møguleika at royna stásiliga ítróttaranleggið í Reykjavík. IT Travel, MB Tours og Atlantic Airways eru komin ásamt um at samstarva um itróttarferðirnar hjá føroyingum til Íslands .

Í løtuni er tað serliga VISA REY CUP, ið verður seinast í juli mánað, sum føroyingar hava sýnt áhugað. Hetta er fótbóltskapping fyri tey yngru, og hon verður hildin við Laugardalsvøllin. Fleiri føroysk feløg hava sett seg í samband við føroyska-íslendska samtakið um kappingina, og stjórin í IT Travel sigur, at ætlanin er at fáa eini fimm føroysk ungdómslið til Íslands í summar.

NSÍ var undan steypafinaluni í fjør á venjingarlegu í Íslandi, og líkt er til, at fleiri feløg ætla at gera teimum tað eftir í ár. Hørður Hilmarsson sigur, at fleiri føroysk feløg hava víst áhuga at koma á venjingarlegu í Reykjavík í julimánað, sum fyrireiking til evropeisku kappingarnar og einari møguliga steypafinalu.

- Vit hava allar hentleikar við Laugardalsvøllin, og tí skuldi vera lag á manni hjá føroyskum feløgunum at komið á venjingarlegu í Reykjavík, sigur stjórin í IT Travel

Umframt at hýsa føroyskum fótbóltsfeløgum í summar, so ætlar Hørður eisini at fáa føroysk hondbóltsfeløg til Íslands til heystar. Vikuskiftið 5-7 september er Reykjavík Open í hondbólti, og IT Travel vónar at bestu hondbóltsfeløgini í Føroyum fara at boða frá luttøku.

# Allan Dal Christiansen vann FM fyri lið

**Spenningurin var stórur, men at enda eydnaðist tað liðnum hjá Allani Dal Christiansen at vinna FM-kappingina**

BRIDGE
*Bogi Simonsen*



*Nýkosnu føroyameistararnir fyri lið. Liðið hjá Allani Dal Christensen varð í ár umboðað av Allani Dal Christensen, Per Kallsberg, Dánjal Paula Mohr, Jóanneso Mouritsen og Heðini Mouritsen.*

Liðið hjá Allan Dal Christiansen gjørdist føroyameistari um vikuskiftið. Spenningurin var stórur undan teimum seinastu umførunum í 1.deild í liðkappingini í bridge. Kappingin hevur alt kappingarárið staðið millum liðið hjá Junior Buss Taxa og liðið hjá Allan Dal Christiansen. Eftir sera sannførandi spæl teir síðstu dystirnar, eydnaðist tað liðnum hjá Allan Dal Christiansen at koppa føroyameistarunum frá í fjør og sostatt at vinna FM-heitið 2002/03.

Á liðnum hjá Allan Dal Christiansen vóru umframt Allan eisini Per Kallsberg — Dánjal Pauli Mohr, Jóannes Mouritsen — Heðin Mouritsen.

**Endaspælið í 1. deild — Úrslit:**

Allan Dal-Christiansen - Símin Lassaberg 24-06
Junior Buss Taxa - Jóna Grunnveit 22-08
Símin Lassaberg - Junior Buss Taxa 22-08
Jóna Grunnveit - Allan Dal-Christiansen 12-18
Allan Dal-Christiansen - Junior Buss Taxa 18-12
Jóna Grunnveit - Símin Lassaberg 06-24

**Endaliga støðan í 1. deild:**

1. Allan Dal-Christiansen 119,5
2. Junior Buss Taxa 97,5
3. Símin Lassaberg 76,0
4. Jóna Grunnveit 63,5

Liðið hjá Jórun Johannesen vann upp- og niðurflyting og verður tískil verandi í 1 deild komandi kappingarár.

Á liðinum hjá Jórun Johannesen leiktu: Jórun Johannesen — Johannes Skaarup, Oddmar Danielsen — Einar Ellingsgaard og Súsanna Dam.

**Upp- og niðurflytingarbólkurin — Úrslit:**

Carl Mikkelsen - Petur Winther 21-09
Jórun Johannesen - Hallur Ellingsgaard 20-10
Petur Winther - Jórun Johannesen 02-25
Hallur Ellingsgaard - Carl Mikkelsen 15-15
Carl Mikkelsen - Jórun Johannesen 13-17
Hallur Ellingsgaard - Petur Winther 25-03

**Endaliga støðan í upp- og niðurflytingarbólkinum:**

1. Jórun Johannesen 62
2. Hallur Ellingsgaard 50
3. Carl Mikkelsen 49
4. Petur Winther 14

Tað vóru nógvar truplar hendur í dystinum um vikuskiftið, og hetta spælið er so avgjørt eitt av teimum torførastu at melda. Vit skulu síggja, hvat hendi við bæði borðini í dystinum millum Símin Lassaberg og Junior Buss Taxa.

| | | |
|---|---|---|
| N/ | Q1092 | |
| | J7 | |
| | QJ1062 | |
| | 95 | |
| 854 | | AKJ763 |
| 1043 | | 986 |
| 953 | | 8 |
| KQ | | J107 |
| | AKQ52 | |
| | AK74 | |
| | A863 | |

Lokað rúm

| S | V | N | E |
|---|---|---|---|
| Rói Joensen | Marner Joensen | Bogi Simonsen | Árni Dam |
| - | - | pass | 2sp |
| D | pass | 3rú* | pass |
| 6rú | pass | pass | pass |

*3rú er Lebensohl, lovar rútara og positiva hond, min. 7hp.

Opið rúm:

| S | V | N | E |
|---|---|---|---|
| Eyðun Anthonius-sen | Arnbjørn Sivert-sen | Símin Lassa-berg | Hans J Peter-sen |
| - | - | 2rú* | 2sp |
| 6rú | pass | pass | pass |

*2rú lovar 6 lit í rútara og veika hond. Hví Símin júst her valdi at opna við 5 liti í rútara, fingu vit ikki at vita, men tað hevði ikki verið órímilgt hjá Eyðuni at meldað 7rú.

13 stikk við bæði borðini og eitt javnt spæl. Tað var onki par, ið meldaði stóraslemmin, og fleiri komu bara í útgang.



# Fimleikaframsýning í Klaksvík

**Sunnudagin hevði Klaksvíkar Fimleikafelag framsýning í KÍ-høllini. Tað var ein fragd fyri eyga at síggja hesar fagru ungdómar, um 270 í tali, sýna fram, hvat tey gjøgnum veturin høvdu vant. Felagið varð endurstovnað á heysti 1998, eftir at hava ligið óvirkið í nøkur ár**

FIMLEIKUR
*Rúna Sivertsen*

Í reyðum jakkum, glað og smílandi, komu tey marsjerandi til tónleikin hjá hornorkestrinum í KÍ-høllina sunnudagin.

Meðan eyga frøddist yvir fagra ungdómin, og oyra gleddist yvir tónarnar frá hornblásarum, fóru tankarnir eina løtu til Bagdad, har ungdómar, eins og okkara, í besta blóma láta lív í meiningsleysum bardaga.

Men her hjá okkum er friður, og eina løtu kundu áskoðararnir njóta at síggja fimu ungu kropparnar sýna fram kynstur síni.

### Plásstrot

Framsýningin sunnudagin var tann fimta, síðani Klaksvíkar Fimleikafelag varð endurstovnað á heysti 1998. Felagið telur 270 limir, og vóru tey flestu við sunnudagin.

Fimleikararnir venja eina ferð um vikuna, men tað er alt ov lítið, sigur Katrin Jacobsen, forkvinna í felagnum.

Hon sigur, at fimleikarahallirnar í Klaksvík eru so nógv upptiknar, at pláss er ikki fyri fleiri tímum.

Felagið hevur gjørt onkran túr út á Glyvrar á venjingarlegu, har góðar kreftir hjá Støkk tóku sær av at venja norðoyingar í lopum.

### Fyrsta felagið 1944

Klaksvíkar Fimleikafelag var fyrstu ferð stovnað undir seinna heimsbardaga. Tað var Eskild Norðbúð, sum stovnaði og var formaður í felagnum. Meðan hann lærdi til hárskera í Havn, var hann við í fimleikararfelagnum har.

Tá hann eftir lokna lærutíð kom aftur til Klaksvíkar, tók hann stig til at stovna felag í heimbygd síni. Hákun Djurhuus, sáli, var venjari hjá ungu dreingjunum, sum bara fáir eru eftir á lívi í dag.

Nakrir av teimum, umframt Eskild, sum við vóru tá - og enn eru okkara millum - eru, Helgo Finn Larsen, Benjamin Joensen og Monrad Niclasen.











